

SLAGIÐ UM HAVNINA

*Fyrrverandi HB leikarin, Christian R. Mouritsen (11), skoraði málið, ið sera týdningarmikla 1-0 sigrinum á grannunum í fjør*

*Mynd: Álvur Haraldsen, savnsmynd*

# B36 argar HB

**VODAFONEDEILDIN Tað var gamalt at HB altíð vann á B36, men síðani teir hvítu og svørtu veruliga traðkaður fram á føroyska fótbóltspallin í seinnu hálvu av 90'inum, er nógv broytt. Nú er meira enn eitt ár síðani seinasta sigur á grannunum, men eru HB'arar blivnir bangnir fyri at spæla ímóti B36?**

Tróndur Arge

– Nei tað eru vit ikki. Vit hava spælt nakrar javnar og tapt nakar. Tað særir altíð eitt HB hjarta at tapa ímóti B36 og tað ætlað vit at broyta mánadagin, sigur HB framherjin, Andrew av Fløtum.

Hjá B36 hevur úrtøkan seinastu dystirnar verið lítil. B36 byrjaði kappingina í ár við at sláa HB úr steypakappingini og vinna tríggjar teir fyrstu dystirnar í landskappingini. Síðani hevur B36 ikki vunnið í fimm dystir. Teir seinastu tveir eru enntá taptir á heimavølli.

– Hetta er nokk tann størsti dysturin á árinum og vit hava góðar vónir. Vit hava vunnið nakrar ferðir á HB í seinastuni og tað ætla vit sjálvandi eisini mánadagin. Fyri okkum hevur tað stóran týdning at vit ikki missa sambandið við HB í oddinum, sigur Christian R. Mouritsen.

HB hevur fingið eina góða byrjan uppá landskappingina, men tapið í Fuglafirði hevur givið hinum avbjóðarinum blóð uppá tonna.

– Úrslitini hava verið góð í ár, men nú taptu vit ímóti ÍF seinasta vikuskiftið. Tað er tí týdningarmikið at vit svara aftur sum skjótast og prógva at vit ikki ætla okkum í nakran aldurdal – og so slett ikki ímóti B36, sigur Andrew.

B36 spældi hóskvøldið fyrru hálvfinaluna ímóti EB/Streymi, meðan HB hevði frí.

– Møguliga kemur tað at hava eina lítla ávirkan á dystin, men vit hava fýra dagar at koma fyri okkum, so tað skuldi ikki ávirka meir enn so, sigur Christian.

Fyri B36 er ógvuliga ósannlíkt at Símun Joesen og Ingi Højsted verða at síggja á vøllinum komandi dystirnar, men Dmitrije Jankovic er við aftur eftir at hava sitið leikbannið av sær í steypadystinum hósdagin, eins og Herbert í Lon væntandi er klárur aftur eftir skaðasteðg. Andrew av Fløtum hevur verið skaddur seinastu tveir dystirnar hjá HB, men hevur vant við fullari ferð hesa vikuna. Kári Nielsen er skaddur, meðan Rógvi Poulsen ikki hevur vant við fullari ferð.

> **Vit hava vunnið nakrar ferðir á HB í seinastuni og tað ætla vit sjálvandi eisini mánadagin**
>
> CHRISTIAN R. MOURITSEN

*trondur@sosialurin.fo*

# Hvassar vespur



*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

**VODAFONEDEILDIN Formsterkasta liðið í Vodafonedeildini er NSÍ, sum hevur vunnið fýra teir seinastu dystirnar. Tað stóð annars illa til, tá NSÍ eftir fýra dystir bara hevði fingið eitt stig. Á Sandoyggini hava teir ongar planir um at leggja kongin**

Tróndur Arge

– Vit fara til Runavíkar fyri at vinna. Teir hava spælt væl í seinastuni, so tað er nú vit skulu taka teir, sigur Mads A. Hentze hjá B71

B71 misti á stokkinum, tá teir í seinasta dystinum tapti 3-2 fyri EB/Streymi. NSÍ vann seinasta umfar heili 5-1 á B36.

– Hetta verður ein ringur dystur, tí tað hevur gingið so gott í seinastuni. Vit møta einum liðið, sum vit á pappírinum helst skulu vinna, men B71 hevur gjørt væl ímóti fleiri av hinum liðnum, sigur NSÍ miðvallarin, Ólavur í Ólavsstovu.

B71 hevur eins og FC Suðuroy seks stig, meðan AB liggur niðast við trimum stigum. Hini bæði botnliðini møtast á Argjum.

– Vit vóna sjálvandi at tað endar javnt á Argjum, men vit skulu vinna okkara dyst og ikki hugsa um tann dystin, sigur Mads A. Hentze, sum hevur skorað fýra mál í ár.

Í Runavík gleða tey um góðu gongdina seinastu vikurnar.

– Gongdin seinastu dystirnar hevur givið okkum sjálvsálit. Tað gekk kanska ikki so væl í byrjanini, men vit hava allatíð havt trúnna uppá at vit kundu koma fyri okkum, sigur Ólavur í Ólavstovu.

Fyri B71 er Frits Eið skaddur, meðan Bojan Zivic er tøkur aftur eftir skaða. NSÍ eru fullmannaðir til dystin mándagin.

*trondur@sosialurin.fo*

## Dystir um vikuskiftið

| | | |
|---|---|---|
| **Vodafonedeildin** | | |
| 24. mai | kl. 15.00 | HB – B36 |
| 24. mai | kl. 15.00 | Víkingur - ÍF |
| 24. mai | kl. 15.00 | NSÍ – B71 |
| 24. mai | kl. 17.00 | AB – FC Suðuroy |
| 25. mai | kl. 18.00 | EB/streymur – B68 |
| **1. deild menn** | | |
| 22. mai | kl. 14.00 | NSÍ - KÍ |
| 22. mai | kl. 15.00 | Víkingur – EB/Streymur |
| 22. mai | kl. 15.00 | B68 – 07 Vestur |
| 22. mai | kl. 15.00 | AB – HB |
| 22. mai | kl. 15.15 | FC Hoyvík - TB |
| **1. deild kvinnur** | | |
| 24. mai | kl. 12.00 | Skála – MB |
| 24. mai | kl. 12.30 | Víkingur – EB/Streymur |
| 24. mai | kl. 13.00 | AB - KÍ |